Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 74/2019 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um ítróttarkappingar

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørji eru almennu tilmælini um, hvørt ítróttarkappingar skulu byrja aftur ella ikki?
2. Hvat heldur løgmaður um, at ítróttargreinar byrja aftur, hóast heilsumyndugleikar mæla frá hesum, um ítróttargreinar ikki megna at lúka tilmælini um t.d. frástøðu og annað?
3. Heldur løgmaður, at sersambondini sjálvi skulu gera av, um teirra ítróttargrein skal byrja aftur ella ikki?

Svar

Til 1:
Sambært tilmælunum kunnu ítróttakappingar byrja aftur leygardagin 9. mai undir skipaðum umstøðum og uttan áskoðarar. Coronaráðgevingin er ætlað at leiðbeina, so samfelagið kann lata upp á besta hátt í mun til smittuspjaðing.

Til 2:
Ítróttargreinar eru ymiskar, sersambondini eru ymisk, feløgini eru ymisk, og umstøðurnar eru ymiskar, og tí eru fyrilitini, sum skulu havast, eisini ymisk. Yvirskipað eiga vit at virða heilsufaklig tilmæli, og tað ræður um at taka avgerðir, sum ikki seta lív og heilsu í váða. Samstundis ræður eisini um at tryggja, at virksemið verður tarnað minst møguligt innan fyri tryggar karmar. Ítróttur hevur stóran týdning fyri heilsuna hjá fólki og er ein savnandi megi í samfelagnum. Ítróttur er eisini miðvís venjing og kapping, og tað er týdningarmikið ikki at forða hesum meir enn hægst neyðugt. Tí má vigast fyri og ímóti og innan fyri skipaðar karmar loyva virkseminum aftur.

Til 3:
Sersambondini kunnu gera av, um tey annaðhvørt vilja byrja aftur ella ikki. Velja tey at byrja aftur, má tað vera í tøttum samstarvi við Coronaráðgevingina fyri at tryggja ein so góðan framferðarhátt, sum til ber í mun til smittuvandan. Coronaráðgevingin veitir ráð og vegleiðing til sersambondini, soleiðis at hesi kunnu taka skynsamar og vælgrundaðar avgerðir í sambandi við tey ítróttarligu tiltøkini, sum tey varða av.

Í Tinganesi, 7. mai 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður